inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Sethús – oman Hoydalar 29, Hoyvík

Húsini eru 2 hæddum við 4 íbúðum – samlað búvídd á uml. 300 fermetrar. Grundøkið er 814 $m^2$. Byggiár: 1978. Íbúð 1 uml. 135 $m^2$: Í neðra er inngongd, durur / gongd / trappugongd, baðirúm, kamar, køkur / alrúm við útgongd til útigólv. Í erva er stova við útgongd til altan, 1-2 kømur, millumgongd, baðirúm og 1 kamar. Íbúð 2 uml. 40 $m^2$: Í neðra er inngongd, gongd, baðirúm, køkur / stova, kamar. Íbúð 3 (2 leigumál) uml. 72 $m^2$: Í neðra er inngongd, gongd, baðirúm (felags), A) kamar við tekøki. Í erva: B) køkur, stova, kamar. Íbúð 4 uml. 50 $m^2$: Inngongd, gongd, køkur / stova, havastova, baðirúm, 2 kømur. Runt húsini er garður / urtagarður. Húsini standa í áttúruvøkrum, veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við frálíkum útsýni. Dagstovnar og skúlar eru nær við.

**Prísuppskot: 2.500.000,00 kr.**



## Tvíhús – Heygsvegur 16, Tórshavn

Talan er um eini nýgg tvíhús har alt er gjørt bæði innan og uttan. Grundøkið er 416 fermetrar til víddar. Húsini eru í tveimun hæddum, har hvær hæddin er 78 fermetrar til víddar. Á veghæddini er gongd, 3 kømur, baðiverilsi, bryggers pg trappa til 1. hædd. Á 1. hædd er gongd, stova og køkur við atgongd til altan, kamar við atgongd til altan og baðirúm. Húsini liggja væl fyri, 10.min oman í býin, sera góðan sólargang og gott útsýnið.

**Prísuppskot : 2.450.000,00 kr.**



## Íbúð – N . Pálsgøta 6, Tórshavn

Íbúðin er í ovastu hædd og er 54,9 $m^2$. Grundøkið er 1/3 av 119 $m^2$. Húsini eru bygd í 2008 sum lágorkuhús við hitapumpu. Vaskimaskina, turkimaskina og allar innleggingar eru við. Har er felags inngongd, trappugongd, egin inngongd, gongd / alrúm / borðsstova / stova / køkur við útgongd til franskan altan, baðirúm og kamar við skápum. Íbúðin liggur í ovastu hædd á nýbygdum húsum mitt í miðbýnum við útsýni yvir Vaglið og oman í Vágsbotn, og stutt er til alt.

**Prísuppskot: 1.200.000,00 kr.**



## Raðhús – Maritugøta 83 Hoyvík

Frálíka snøgga raðhúsið er í 2 hæddum á 57 $m^2$ og úthús / hjallur á 3,6 $m^2$ – í alt 117,6 $m^2$. Hartil er felags skúrur til amboð v.m. á uml. 50 m2. Grundøkið er 130 $m^2$. Byggiár: 2007. Í niðaru hædd er hjallur / úthús, inngongd, gongd, køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til útigólv / terassu. Í ovaru hædd er trappupallur, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi í góðum grannalagi nær nýggja miðøkinum við Karlamagnusarbreyt. Har eru barnagarðar, býlingshús, skúlar, FIFA-sparkivøllur og fleiri spælipláss.

**Prísuppskot : 1.900.000,00 kr.**



## Sethús – Sivarsvegur 12, Hoyvík

Sera snøggu og framúr væl hildnu húsini eru í 3 hæddum. Miðhæddin er 108 $m^2$, niðasta hædd 102 og ovasta hædd um 70 $m^2$ – í alt 280 $m^2$. Grundøkið er 502 $m^2$. Byggiár: 1983, men húsini eru dagførd og viðlíkahildin, so tey eru sum nýggj. Í miðhæddini er hjallur, inngongd, durur, gestawc, hall / trappugongd, køkur / alrúm, grovkøkur / brygges við útgongd til hjallin, stór borðsstova / stova við útgongd til altan / útigólv. Í erva er trappugongd, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur – eitt við útgongd til altan. Í neðra er inngongd, gongd / fýrrúm, trappugongd, vaskirúm, turkirúm við útgongd til snóratræ, ítrivsrúm, goymslurúm og sera snøgg garaga. Lætt at gera íbúð í niðastu hædd. Sera snøggur garður / urtagarður er uttanum. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Dagstovnar, býlingshús, skúlar, sparkivøllur og busssamband er nær við.

**Prísuppskot : 2.600.000,00**



## Jørð – Vágur, Vágur

Jørð – í Brekkubø –, Vágur.Talan er um eitt stórt jarðarstykki á knappar 7.000 $m^2$, sum samb. galdandi byggisamtykt fyri Vágs kommunu liggur í B2-bústaðarøki. Jørðin liggur sera væl fyri í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi, mitt í bygdini, skjótt til handil og skúla. Sera gott og vakurt útsýni út á fjørðin.

**Verður seld, um hóskandi boð fæst.**



## Sethús – Fagralíð 3, Skála

Nyggju sethúsini eru í 3 hæddum Ovasta hæddin íð ikki er inrættað, er 80 $m^2$, miðhæddin er 108 $m^2$ og kjallari 108 $m^2$, íalt 296$m^2$. Grundøkið 1545 $m^2$. Byggiár: 2003. Í miðhæddini er gongd, baðirúm við brúsu,klædnarúm, 2 kømur køkur, stova, trappa niður til niðastu hædd og trappuuppgongd til loftið. Í niðastu hædd er, gongd, kamar, wc, goymslurúm, vaskirúm/fýrrúm og garaga. Húsini hava føroyaprofilklædning, plastikkvindeygu og takið er aluminium, við íð keypinum er eisini tilfar til inrættan av loftið. Húsini standa væl fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi, hava sera gott útsýni og eru tætt við allar hentleikar.

**Prísuppskot: 1.650.000,00 kr.**



## Íbúðarbygningur – Íslandsv. 24, Tórshavn

Húsini eru 3 hæddum á 2x114 + 1x91=319$m^2$ við 4 íbúðum. Grundøkið er 640 $m^2$. Byggiár: 1967 / 1992. Húsini eru væl bygd við betondekki millum hæddirnar og eru dagførd so við og við. M.a. er klædningur, vindeygu og úthurðar skift og onnur íbúðin í miðhæddini er dagførd í 2001 og onnur í neðra í 2005. Íbúðin í vestara partinum í miðhæddini hevur inngongd, gongd, køkur, stova og kamar. Í ovastu hædd er trappugongd, baðirúm og 2 kømur. Íbúðin í eystara partinum í miðhæddini hevur inngongd, gongd, køkur, borðsstova / alrúm, stova, kamar og goymslurúm. Í ovastu hædd er trappugongd, baðirúm og 2 kømur. Íbúðirnar í ávikavist vestara og eystara partinum í niðastu hædd hava inngongd, gongd, stova / borðsstova, baðirúm og kamar. **Les meira á www.inni.fo.**

**Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.**



## Virkisbygningur – Klaksvíksv. 54, Klaksvík

Talan er um Filana, gamla spinnaríið í Klaksvík, bygningurin er í 3 hæddum. Byggiár 1967. Búøkið 217 fermetrar. Øll niðara hæddin ( handilshøli) gjørd av nyggjum í 2006, og nýggj oljufýr og ketil frá 2006. Eisini er nýtt elektricitet lagt inn.Húsini eru stoypt upp men ovara síða er klødd við timbri.

**Verður selt um hóskandi boð fæst**



## Íbúð – Maritugøta 38, Hoyvík

Nýggj marglætisíbúð, klár at flyta inn í. Talan er um eina endaíbúð á aðru hædd 78 fermetrar + 4 fermetrar goymslurúm. Harafturat er lemmur uppá stórt ovastaloft, vælegnað til goymslu. Byggiár: 2006. Íbúðin er væl gjørd í góðum byggjaríi við góðum tilfari, hon er nýmálað og gólvini eru matt lakerað ask. Í baðirúminum, gongini og goymslirúminum eru flísar við hita í. Allar hvítvørur eru av besta merki. Betonveggir eru millum íbúðirnar og betondekk millum hæddirnar, so ikki hoyrist ímillum. Har er goymslurúm, inngongd, gongd, baðirúm / vaskirúm, hjúnarrúm, kamar, køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til altan. Íbúðin liggur í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við góðum grannalagi. Har er sera barnavinaligt við spæliplássi og FIFA-vølli beint við. Dagsstovnur og býlingshús er nær við, og bilfrí gøta er millum býlingarnar og oman til skúla. kirkju, handil m.v.

**Íbúðin verður seld um nøktandi boð fæst.**



## Sethús – Djóna í Geilsgøta 9 – Vaktarhúsbrekka 2, Tórshavn

Húsini eru 3 hæddum. Niðasta hædd og miðhæddin eru 72 $m^2$ og ovasta hædd er 50$m^2$. Hartil eru 20$m^2$ úthús – í alt 214$m^2$. Grundøkið er 351 $m^2$. Byggiár: 1958. Húsini eru dagførd so við og við. M.a. er tak, klædningur, vindeygu, hurðar, ketil og oljufýr skift. Í miðhæddini er inngongd, durur, gongd, køkur, borðsstova / stova við útgongd til útgólv, hjúnarrúm, baðirúm og 1-2 kømur. Í ovastu hædd er trappugongd, kamar, alrúm / stova / kamar. Í niðastu hædd er inngong, durur / gongd, kamar, køkur, stova, kamar, millumgongd, baðirúm, vaskirúm, fýrrúm / kjallararúm og garaga. Húsini standa í friðarligum umhvørvi nær miðbýnum og stutt er til skúlar, dagstovnar, handlar o.m.a. Húsini standa nær miðbýnum.

**Prísuppskot : 1.900.000,00**



## Grundstykki – Skopun

Talan er um eitt jarðastykki, sum er velt, býtt í fýra partar, ávikavist 1332, 306, 310 og 174 fermetrar til víddar. Stykkini liggja heilt einastandi væl fyri, tætt við bygdina, íalt 2.200 fermetrar, væl egnað til seyð, úthús o.a. Vegur er til jørðina. Útsýnið er einastandandi gott út á fjørðin

**Verður selt, um hóskandi boð fæst.**



## Grundstykki – undir Gráasteini 46, Tórshavn

Talan er um eitt grundstykki, 556 fermetrar til víddar. Stykkið er sera slætt og lætt er at planera. Liggur friðaligt og frítt fyri, nakað av útsýni, tætt við dagstovn og komandi skúladepil við Marknagilsvegin. Skjótt til gongu heim í miðbýin.

**Verður seld, um hóskandi boð fæst.**



## Sethús – Giljavegur 23 Sandavágur

Húsini eru í 3 hæddum – samlað búvídd á 160 $m^2$. Grundøkið er 1.067 $m^2$. Byggiár: 1947, men húsini eru høvuðsumvæld og dagførd í fleiri umførum í 2000, 2003 og 2007, so tey nú eru í góðum standi. Alt er nýtt: vatn, el, hiti, kloakk, baðirúmið, kømurini á loftinum, hitarør, nýggj frárensl og bjálvað er undir gólvinum í miðhæddini. Í miðhæddini er inngongd, gongd / garderoba / trappurúm, køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til stórt útigólv. Í ovastu hædd er trappupallur / spælirúm / gongd, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, vaskirúm, fýrrúm, kjallararúm og stórur hjallur. Runt húsini er garður / urtagarður. Húsini standa væl fyri við høvuðsveg í friðarligum, vøkrum og veðurgóðum umhvørvi við ánna, ítróttarøkið og kirkjuna. Stutt er til barnagarð, vøggustovu, skúla og busssamband. Frálíkt útsýni er yvir bygdina og vágna

**Prísuppskot : 1.000.000,00**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni